# Kunningardagar um AFS

**Í hesum døgum hevur AFS Føroyar fleiri kunningarfundir um virksemið hjá felagsskapinum. Millum annað sakna fyriskipararnir sjálvboðin, sum kunnu vera við til at gera uppihald og upplivingar annars so góð og jalig sum møguligt**

AFS

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Nógvir AFS´arar hava vitjað Føroyar millum ár og dag. Her er tað týska Carolin Pecho saman við vertsfamiljuni, sum búði í Føroyum í 2002/2003*

Mynd: Jens Kr. Vang

Geografiska fjarstøða Føroya er ofta uppi og vendir, og tað kann hava bæði fyrimunir og vansar. Í førinum hjá AFS Føroyum hevur tað mest vansar við sær, tí orsakað av fjarstøðuni, hevur higartil verið torført at eftirútbúgva tey sjálvbodnu.

Men nú er vend við at koma í. Nú verða fýra fólk um árið send til eftirútbúgvingar í Danmark, og í hesum døgum verður skipað fyri fleiri kunningarfundum og verksmiðjum saman við trimum vitjandi frá AFS Interkultur í Danmark.

Lene Godiksen, Mia Hvilshøj og Anne Sofie Johansen koma nevniliga til Føroya fyri at geva íblástur til AFS virksemið her heima.

### Byrja í Vestmanna

Orsøkin til, at tær tríggjar koma er, at í Damark er møguleiki fyri tey sjálvbodnu í AFS Interkultur at eftirútbúgva seg á fleiri ymsum skeiðum og verksmiðjum.

– Vit hava leingi roynt at fingið í lag, at vit í Føroyum eisini skuldu fáa møguleika fyri eftirútbúgving, tí vit, orsakað av geografisku fjarstøðuni, so at siga eru við skerdan lut, tí okkara møguleikar eru ikki teir somu, greiðir Elisabeth Holm frá AFS Føroyum frá.

Byrjað verður við einum kunningarfundi í Vestmanna skúla hósmorgunin, har næmingarnir á framhaldsdeildini verða kunnaðir um nýggja norðuratlantiska summarprogrammið, heilársprogrammið og vertsfamiljuprogrammið.

Síðani verður farið til Hoydalar, har ein annar kunningarfundur, um møguleikarnar hjá teimum, ið eru yvir 18 ár. Har eru nevniliga tvey serlig programm, har ein hevur møguleika at fara til lond kring allan heim at arbeiða sjálvboðið, búgva hjá eini vertsfamilju og harafturat fáa innlit í land, mál, mentan og øllum tí spennandi, sum hartil hoyrir.

### Lokalfelagsarbeiði

Stórur tørvur er á sjálvbodnum í Føroyum, sum vilja seta tíð av at geva bæði ungum føroyingum og ungum útlendingum eina so góða uppliving sum møguligt.

Elisabeth Holm vísir á, at AFS gevur nógv aftur til samfelagið og skapar møguleikar. Tað eru nógvir føroyingar, ið hava verið við AFS, ið hava eitt heilt serligt innlit í mál og mentan í einum ávísum landi, og tað kann heilt vist geva ágóðar seinni.

Tær donsku kvinnurnar koma millum annað at kunna um, hvat fyri møguleikar eru – bæði fyri vertsfamiljur og fyri tey, ið send verða avstað.

Fríggjadagin verður tað serliga lokalfelagsarbeiðið, ið verður á skránni. Hetta verður eisini í studentaskúlanum í Hoydølum, og er fundurin fyri øll, sum hava áhuga fyri lokalfelagsarbeiði. Tørvur er millum annað á fólki, sum hava áhuga í at arbeiða við sendiprogramminum og vertsfamiljuprogramminum.

### AFS upp at standa

– Vit vilja fegin hava AFS Føroyar ordiliga upp at standa aftur, soleiðis at øll kunnu verða so væl fyrireikað sum møguligt. Bæði tey, ið verða send avstað og tey, ið koma til Føroya, sigur Elisabeth Holm.

Tað er eins og áður eisini møguleiki fyri at gera vertsfamilja fyri einum útlendskum skiftisnæmingi her heima í Føroyum. Hetta fara tey í AFS at kunna um leygardagin – eisini í Hoydølum. Her fara tey at greiða frá, hvat krevst fyri at gerast vertsfamilja, tí ofta vísir tað seg, at fólk ikki tora at taka ímóti einum heilt fremmandum næmingi.

Hesir dagarnir eru ein upplagdur møguleiki fyri fólk, ið eru forvitin at finna útav, hvat AFS gongur út uppá, og hvussu ein kann gerast ein partur av einum væl virkandi felagsskapi, sum arbeiðir fyri at niðurbróta fordómar, skapa vinarløg og byggja brýr landanna millum.

# Hallið kann gerast størri

**Bárður Nielsen váttar, at fyrstu mánaðirnir í ár hava sýnt eini minni-inntøku fyri avgjøld, men hann bæði vónar og roknar við, at hetta fer at laga seg í árinum**

FÍGGJARLÓGIN

*Jákup Mørk*



*- Eg bæði rokni við og vóni, at inntøkurnar av avgjøldum fara at økjast, soleiðis at talan ikki verður um negativ frávik á inntøkusíðuni, sigur Bárður Nielsen*

Tað tykist vera vandi fyri, at landskassaroknskapurin fyri inniverandi ár fer at gerast væl ljótari, enn tær 228 milliónirnar, sum seinastu framrokningarnar annars søgdu.

Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at talan væl kann gerast um eitt hall, sum verður upp ímóti 400 mió kr., tá avtornar. Hetta tí inntøkurnar til landshúsarhaldið gerast væl minni enn tað, sum roknað varð við.

### Væntar eina betran

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, váttar, at talan í løtuni er um lægri inntøkur enn tað, sum mett varð í fíggjarætlanini.

– Sjálvur hvørki vóni eg ella rokni við, at talan fer at gerast um nøkur stórvegis frávik í inntøkumetingunum. Skattainntøkurnar fyri fyrstu tríggjar mánaðirnar eru á leið tað, sum roknað varð við, og nú bæði hýsu- og toskaprísirnir eru kvinkaðir nakað uppeftir, samstundis sum russaraavtalan hevur skapt nakað av virksemi, vænti eg ikki, at apríl mánaður verður lakari.

– Hinvegin er talan um eina minni inntøku av avgjøldum. Tað kundi bent á, at nýtslan hjá fólki hevur verið minni enn mett fyrstu tríggjar mánaðirnar, men tað kann so eisini hava sínar orsøkir. Eitt nú kann hugsast, at seinkanin av nýggju avgjaldslógini hevur havt eina broyting í innflutningsmynstrinum við sær, sigur landsstýrismaðurin, sum eisini roknar við, at hetta fer at javna seg í árinum.

– Vit hava framvegis eina byggivinnu, sum hevur nógv at gera, og eitt nú skulu eini 175 sethús byggjast í Hoyvíkarhagunum, so tað er einki sum bendir á, at aktiviteturin fer niður í bræði. Lønarútgjaldingarnar hava eisini verið á leið tí, sum roknað varð við, og tí trúgvi eg einki uppá, at minkanin í avgjøldunum verður varandi.

### Gjaldførið er gott

Tað hevur eisini ljóðað, at ein lánstøka upp á eina hálva milliard er neyðug hjá landskassanum, soleiðis at gjaldførið kann betrast, men hetta kennis Bárður Nielsen als ikki við. Hann heldur, at talan helst byggir á eina misskiljing.

– Tað er rætt, at vit hava tosað um møguleikan fyri lántøku, men hetta er so ikki tengt at gjaldførinum í Landsbankanum. Har kunnu vit hava eitt yvirtrekk upp á 70% í óavmarkaða tíð, so talan er als ikki um nakra akutta støðu.

– Hinvegin, so er rentan metlág í løtuni, og tá vit vita, at vit í heyst skulu umfíggja 375 mió í lánsbrøvum, so er spurningurin meira, hvørt vit skulu taka eitt lán her og nú, ella um vit skulu bíða til heystar, sigur altso landsstýrismaðurin.